# Eldur í læknaíbúð

*Rúnar Reistrup*

Mikunáttina kl. 00.50 varð boðað frá eldi í einari av læknaíbúðunum oman fyri Landssjúkrahúsið. Sløkkiliðið kom á staðið beinanvegin og fekk skjótt bast eldinum, sum vísti seg at vera kyknaður í einum skrelliposa.

Eingin búði í íbúðini, sum var undir umvæling. Eldurin hevði heldur ikki breitt seg í íbúðini, ið mestsum øll er av betong, og tí var ongantíð vandi á ferð.

Skrelliposin, har eldurin kyknaði, var fullur av pussistøvi, og helst hevur annaðhvørt ein sigarettstubbi ella ein klútur, ið brúktur hevur verið at lakera við, fest í.

Lítil skaði stóðst av eldinum inni í íbúðini, tí sløkkiliðið slapp inn ígjøgnum eina opna altanhurð og nýttist ikki at brúka vatn fyri at basa eldinum.



*Íbúðin, har eldur kyknaði mikunáttina, var undir umvæling og stóð tískil tóm.*
Mynd: Jógvan Øregaard

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Fleyr til gul av ymsum ættum og fyrrapartin væntandi turt og sólglottar, men seinni sirm ella mjørki. Hitin millum 16 og 19 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Lot til andøvsgul av suðri og yvirhøvur turt og sólglottar, men mjørki í støðum. Hitin millum 17 og 20 stig, men har mjørki legst – um 14 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Um morgunin gul til stívt andøvsgul av landsynningi og regn, men um middagsleitið støkkur hann vesturum til ein strúk av útsynningi og sólglottar, men eisini ælingur. Hitin millum 16 og 19 stig.

**Veðrið sunnudagin og mánadagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og sunnudagin okkurt ælið, men mánadagin yvirhøvur turt. Hitin millum 12 og 16 stig.

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | 9 |
| Nuuk | 9 |
| Qaqortoq | 14 |
| Ammassalik | 11 |
| Saint John's | 11 |
| Halifax | 17 |
| Reykjavík | 14 |
| Seyðisfjørður | 11 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 16 |
| Aberdeen | 18 |
| London | 30 |
| Tromsø | 16 |
| Bergen | 17 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 22 |
| Keypmannah. | 23 |
| Helsinki | 20 |
| Moskva | 19 |
| Berlin | 26 |
| Warzawa | 24 |
| Kiev | 22 |
| Bukarest | 29 |
| Paris | 35 |
| Madrid | 32 |
| Róm | 32 |
| Malorca | 33 |
| Athen | 31 |
| Malta | 32 |
| Tunis | 33 |
| Beijing | 32 |
| New Dehli | 32 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 17 |
| New York | 26 |
| Miami | 27 |
| Los Angeles | 24 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 9 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 10 |

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 1018 hPa. skamt vestan fyri Føroyar fer spakuliga í landnyrðing og grynnist. Eitt hátrýst, 1025 hPa. yvir Suður-Noreg fer spakuliga suðureftir.




Lágtrýstið í útsynning úr íslandi fer spakuliga í útnyrðing og brúgvalagið haðani verður skamt vestan fyri Føroyar.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 05/08 kl. 06[00]– 06/08 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 11,8°
Minsti hiti máldur í aug.: 0,2° Mesti hiti máldur í aug.: 22,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 1,0 mm – mált frá 05/08 kl. 06[00]–06/08 kl. 06[00]
Avfallið higartil í august: 17,3 mm







## VESTFALLSKYRRINDI

5. august: Fyrra kvarter
6. august: Mánin næstur jørðini
12. august: Fullmáni

Kelda. Álmanakkin 2003

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 7. aug | 02.58 | 15.26 | 01.58 | 14.26 | 02.13 | 14.41 | 04.58 | 17.26 | 05.58 | 18.26 | 01.13 | 13.41 | 00.13 | 12.41 | 03.13 | 15.41 | 04.13 | 16.41 | 02.43 | 15.11 | 03.58 | 16.26 |
| 8. aug | 03.54 | 16.23 | 02.54 | 15.23 | 03.09 | 15.38 | 05.54 | 18.23 | 06.54 | 19.23 | 02.09 | 14.38 | 01.09 | 13.38 | 04.09 | 16.38 | 05.09 | 17.38 | 03.39 | 16.08 | 04.54 | 17.23 |
| 9. aug | 04.52 | 17.21 | 03.52 | 16.21 | 04.07 | 16.36 | 06.52 | 19.21 | 07.52 | 20.21 | 03.07 | 15.36 | 02.07 | 14.36 | 05.07 | 17.36 | 06.07 | 18.36 | 04.37 | 17.06 | 05.52 | 18.21 |
| 10. aug | 05.51 | 18.21 | 04.51 | 17.21 | 05.06 | 17.36 | 07.51 | 20.21 | 08.51 | 21.21 | 04.06 | 16.36 | 03.06 | 15.36 | 06.06 | 18.36 | 07.06 | 19.36 | 05.36 | 18.06 | 06.51 | 19.21 |

5 707265 100043 >